# Danir spentir uppá FAS

**Seinastu tíðina hava fólkini handan Føroya Altjóða Skipaskráseting arbeitt við at marknaðarføra skipanina beinleiðis til útlendskar reiðarar. Hetta sær út til at geva úrslit, tí nøkur donsk reiðarí, har ímillum tvey stór, vísa nú áhuga fyri skipanini**

SKIPASKRÁSETING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hósdagin í seinastu viku helt Føroya Altjóða Skipaskráseting fund við 16 ymisk donsk reiðarí. Fundurin varð hildin á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn, har Herálvur Joensen sendimaður okkara í Keypmannahavn var vertur, Sum skilst var talan um ein sera positivan fund.

- Vit hava leingi hildið, at tað er best at fara beinleiðis til reiðaríini, tí soleiðis koma vit beinleiðis í kontakt við skipini. Tað vísir seg eisini at rigga, tí reiðaríini vóru sera positiv, og nøkur vísa reellan áhuga fyri skrásetingini hjá okkum, sigur Tommy Petersen, stjóri í FAS.

### Ymisk reiðarí

Tá ein tílíkur fundur verður hildin, so eru reiðaríini ójøvn í stødd.

- Tey størstu hava meiri enn 100 skip, meðan tey minstu hava eini 6-8 skip, staðfestir Tommy Petersen, sum fegnast, at áhugin í báðum bólkum var rímiligur.

- Tað eru nøkur, sum hava biðið um at fáa framløgurnar hjá okkum, so tey kunnu kanna við baklandinum, um vit kunnu bjóða eina skipan, ið virkar til teirra fyrimuns, fortelur stjórin.

### Skapa álit

Tað var hósdagin, at fundurin var, og fyri at fáa eitt sindur meira tyngd í framløgurnar, so hevði FAS fýra ymiskar serfrøðingar við. Sambært Tommy Petersen vóru hesir við til at skapa álit til møguligu kundarnar.

- Í hesi vinnuni selja vit álit, og tí er tað so týdningarmikið, at vit altíð syrgja fyri at fara beinleiðis til kundan, staðfestir Tommy Petersen. Hann leggur afturat, at tað veldst um at røkta kundan so væl sum gjørligt, tí soleiðis fær mann skapt álit.

### Kann skapa pening

Hóast sjálv skrásetingin ikki kastar heilt nógv av sær, so roknar Tommy Petersen við, at tað kann skapa nógv virksemi, um tað verður gjørligt at lokka fleiri kundar hendaveg.

- Tað er fyrst og fremst spinoff effektin, sum kann skapa pening. Tá skip verða skrásett í Føroyum, so kann hetta heilt skjótt hava við sær, at fleiri føroyskir yvirmenn koma umborð á skipini, at fakfólk á ymsum økjum lata tænastur í hesum sambandi og so framvegis. Tað er tann vegin, hetta kann skapa eina rímiliga mongd av umsetningi, vísir stjórin í FAS á.

### Noreg tað næsta

Ætlanin er eisini at fara til onnur lond í Evropa at vísa fyrimunirnar við skipanini fram, og næsta land á leiðini verður Noreg.

- Vit fara til Noregs at hava ein líknandi fund, tí hetta vísti seg at rigga heilt væl, við at hava ein rímiliga formellan fund, staðfestir Tommy Petersen. Somuleiðis sigur stjórin í FAS, at ætlanin er at fara til onnur lond í Evropa, tí hetta er eitt konsept, sum fólkini handan skipanina trúgva uppá.

Hóast onki ítøkiligt úrslit er komið enn, so vísir Tommy Petersen á, at hann er bjartskygdur, og at nakrar kontaktir eru skaptar, sum skulu røkjast væl komandi tíðina. Tí tá kunnu veruligu úrslitini koma.



*Tommy Petersen, stjóri í FAS, er sera bjartskygdur, nú nógv sambond eru komin við donsk reiðarí*

WWW.BST.FO



Móttøka

Í samband við at stovnarnir – Royndarstøðin í Kollafirði og Búnaðarstovan eru løgd saman og at Bjørn Patursson er settur stjóri á samanlagda stovninum verður móttøka á Búnaðardeplinum fríggjadagin, tann 6. mars 2009 ml. kl. 13-16.

BÚNAÐARSTOVAN
Frammi í Dali 166 • 410 Kollafjørður
tlf. 47 90 00 • fax 47 90 20 • bst@bst.fo



Super populært skeið!
Miðalkarakterur 10,7

SKEIÐ til byrjarar
16. og 17. mars '09

Excel I
- tey fyrstu fetini

**Situr tú enn við roknimaskinuni** og hyggur eitt sindur øvundsjúk/ur eftir teimum, sum bara tasta alt inn á Excel og vupti, so er úrslitið klárt? Ella brúkar og hevur tú kanska brúkt Excel í minni mun, men kundi hugsa tær at lært forritið heilt frá grundini?

**Tað er nú tú hevur møguleikan** at læra og fáa stóra gleði av Excel. Kom á 2-daga skeið saman við tínum líkum og fá Excel-dreymin uppfyltan;-). Teknað teg skjótast, tí plássið er sera avmarkað!

**Um Excel**
Excel er eitt rokniark, har tað er møguligt at arbeiða við tølum og grafum uppá allar hugsandi (og óhugsandi) hættir. Við at luttaka á hesum skeiðnum, fært tú grundleggjandi kunnleika til Excel. Tú lærir tær mest brúktu og mest týðandi funkurnar. Aftaná skeiðið kanst tú brúka og fáa stóra gleði av forritinum í tínum dagliga arbeiði.

**Skeiðið vendir sær til tey**, sum hava hug til, ja kanska í longri tíð hava havt hug til, at læra tær grundleggjandi, týðandi og mest brúktu funkurnar í Excel.

**Tú hevur lítlar ella ongar** royndir við Excel frammanundan, men vit rokna við, at tú hevur arbeitt við teldu áður.

**Tilmelding og les meira** um skeiðið á heimasíðu okkara - www.synergi.fo. Tú ert eisini vælkomin at ringja.

**Vælkomin til tiltøk hjá Synergi**

**MAX. 14 LUTTAKARAR!**

Synergi

Synergi • Tvørgøta 13 • 100 Tórshavn • www.synergi.fo • synergi@synergi.fo
32BELL (322355) • 322FAX (322329) • skype: synergiasa